# Valskipanin óegnað til fólkaatkvøðu

**Við einum valdømi kundu vit fingið ein betri skipaðan útjaðarapolitikk, í staðin fyri hesar jólagávurnar, sum nú verða býttar út á hvørjum ári, heldur Ingibjørg Berg, stjórnmálafrøðingur, sum metir málið vera óegnað til fólkaatkvøðu**

VALSKIPAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

- Hvat heldur tú um uppskotið hjá løgmanni um at senda spurningin um eitt valdømi til fólkaatkvøðu?

- Tað er at seta spurningin um fólkaatkvøðu í so einfalt upp, tá fólk vilja vera við, at tað hevði skapt stóra spjaðing millum útjaðara og miðstaðarøkið, heldur Ingibjørg Berg, stjórnmálafrøðingur, sum ikki metir tað vera eina sjálvfylgju, at fólk í útjaðaranum eru ímóti einum valdømi.

- Tvørturímóti eru fleiri tekin um, at fólk í eitt nú Suðuroy, hóast tey eru lutfalsliga yvirumboðaði í tinginum, ikki kenna á sær, at tey fáa nóg nógv burturúr verandi skipan. Onkur í Útoyggjafelagnum er enntá farin so langt sum at taka undir við einum valdømi, tí tað valla verður verri enn undir verandi skipan.

### Tilvildin má ikki ráða

Ingibjørg Berg heldur, at spurningurin um valskipan er í so lítil og tekniskur til at mobilisera fólk. Millum annað nevnir hon onnur mál í nýggjari tíð, ið høvdu verið meira upploøgd at lagt til fólkaatkvøðu – eitt nú yvirtøkulógin og lógin um uttanríkispolitiskarheimildir.

Tó heldur hon fyrst og fremst, at hetta er ein spurningur um, hvørja demokratiska linju vit ynskja. Í verandi stýrisskipanarlóg eru fólkaatkvøður ikki ein møguleiki, meðan Stjórnarskipanarnevndin skjýtur upp at brúka fólkaatkvøður sum demokratiskt amboð.

- Markið fer altíð at vera ein politisk avgerð. Skil má vera í og tað má ikki vera tilvildarligt og uttan proportiónir, sigur Ingibjørg Berg, sum umframt at vera umboð Føroya í Demokratinevnd Norðurlandaráðsins, eisini var limur í Stjórnarskipanarnevndini.

Hon vísir á, at tað eisini er ein spurningur um at venja bæði fólk og politikarar við at nýta fólkaatkvøður sum amboð, so tað er konstruktivt og tænir demokratiinum.

- Verður fólkaatkvøða bert tikin fram av og á, tá politikarar av eini hvørjari orsøk ikki vilja taka støðu, var kanska betur, um møguleikin ikki var til.

### Fjølbroyttari tingmanning

- Hvat heldur tú um uppskotið hjá løgtingsformanninum um Føroyar sum eitt valdømi?

-Grundleggjandi eri eg fyri einum valdømi. Og eg beri ongan ótta fyri, at tað einans verður eitt slag av professionellum politikarum, sum tá verða valdir. Tvørturímóti ímyndi eg mær størri fjølbroytni. Tak til dømis ein mann sum Heina O. Heinesen, sum eg avgjørt rokni við varð valdur, stillaði hann upp í einum valdømi. Hann er ein ávíst typa, sum talar til fólk í øllum landinum, og eg trúgvi at nógv sum hann, høvdu havt betur møguleika í einum valdømi, sigur hon.

### Hækkar støðið

Harumframt metir Ingibjørg Berg tað vera ein demokratiskur veikleiki, at vit hava eitt óumboðandi ting.

- Tí hví skulu summar atkvøður verða meira verdar enn aðrar, bara tí tær landafrøðiliga hoyra til eitt ávíst øki? Tað eru so nógv onnur parametur, sum eins væl kundu verið avgerandi í dag, eitt nú klassar ella kyn, sigur Ingibjørg Berg.

Hon greiðir frá, at vit longu nú hava eina óformliga útjaðarasamgongu.

- Hendan er góð á tann hátt, at fokus verður sett á mál, sum viðvíkja útjaðaranum. Tað negativa við henni er, at vit til tíðir hava orðaskifti og avgerðir í tinginum, sum eru fullkomiliga irrationellar, sigur Ingibjørg Berg.

- Við einum valdømi kundu vit fingið ein betri skipaðan útjaðarapolitikk, í staðin fyri hesar jólagávurnar, sum nú verða býttar út á hvørjum ári.



*- Verður fólkaatkvøða bert tikin fram av og á, tá politikarar av eini hvørjari orsøk ikki vilja taka støðu, var kanska betur, um møguleikin ikki var til, sigur Ingibjørg Berg, stjórnmálafrøðingur*

---

# Broytið heldur útrokningarhátt

**Petur Zachariassen, hagfrøðingur, heldur tað verða skeivt at brúka brekini í valskipanini sum umbering fyri at broyta til eitt valdømi.**
**- Tað kann gerast lættari við øðrum útrokningarhátti, sigur hann**

VALSKIPAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Petur Zachariassen er hagfrøðingur og granskar valtøl og skipanir.

- Hvat heldur tú um uppskotið hjá løgtingsformanninum um Føroyar sum eitt valdømi?

- Eftir síðsta valg var stór ónøgd við, at flokkarnir, sum fingu flestar atkvøður, ikki eisini fingu flest tinglimir. Hetta var helst eisini ein av orsøkunum til nógva orðaskiftið um valskipan okkara, sum nú helst hevur við sær, at løgtingsformaðurin skjýtur eitt valdømi upp, sigur Petur Zachariassen. Hann hevur mangan borið fram, at tað ber til at bøta um veikleikarnar við verandi skipan á annan hátt, enn við at umskipa alt til eitt valdømi.

- Fólk brúka brekini í verandi skipan sum umbering fyri at broyta til eitt valdømi. Men tað kann gerast við øðrum útrokningarhátti. Sostatt ber til at varðveita valdømini, og kortini rætta skeivleikarnar, sigur Petur Zachariassen, hagfrøðingur.

### Skapar split

- Hvat heldur tú um uppskotið hjá løgmanni um at senda spurningin um eitt valdømi til fólkaatkvøðu?

Í mun til uppskotið hjá løgmanni um at senda spurningin út til fólkaatkvøðu, heldur Petur Zachariassen, at frægast hevði verið at bíða til eftir valgið. Eisini sigur hann seg vera samdan við teimum sum vilja vera við, at vandin við fólkaatkvøðu er, at tað fer at skapa óneyðuga harðligt orðaskifti og split millum miðstaðarøkið og útjaðaran.

- Harumframt kundi ein sagt, at vit hava ikki traditión fyri at senda slíkt út til fólkaatkvøðu, so eg ivist í, hvussu skilagott tað er, sigur hann.

Uppá spurningum um, hvat hann persónliga heldur um eitt valdømi, sigur Petur Zachariassen seg hava sympati fyri, at vit hava politikarar úr øllum landinum.

- Søguliga vóru tey fólkavaldu vald at umboða eitt øki, og eg haldi, at tað er ein legal grundgeving fyri at bjóða seg fram, sigur hann.

Kortini hevur hann mangan ilskast um, at lokalpolitikkur kemur fram um landspolitikk. Eitt nú innan hansara egna økið, gransking og útbúgving.

- Við verandi skipan hava stovnar sum Setrið og skúlin í Hoydølum ongan góðan. Hetta er grátuligt, og kanska eisini høgi prísurin fyri lokalpolitikkin, sum verður førdur í løtuni, sigur hann.

- Men betur hevði helst verið at justera verandi valskipan, og í hesum sambandi kjakast um, hvussu flokkarnir kunnu tikið landafrøðilig og kynslig atlit longu í uppstillingini, sigur Petur Zachariassen, hagfrøðingur.



*Vit kunnu fáa eitt rættvísari býti við at broyta útrokningarháttin. Eisini áttu vit at kjakast um, hvussu flokkarnir kunnu taka landafrøðilig og kynslig atlit longu í uppstillingini, sigur Petur Zachariassen, hagfrøðingur.*